## Svimjihøll til kvinnur

Tað gongst sera illa at fáa tær muslimsku kvinnurnar í Danmark at svimja í teimum almennu svimjihallunum. Nú hevur ein býráðslimur í Silkeborg skotið upp, at svimjihøllin í býnum skal hava serligar svimjitíðir til kvinnur. Sosialdemokraturin Mustafa Kellegøz heldur, at ein tílík skipan hevði lokkað innflytarakvinnurnar út í hylin. Danski Fólkaflokkurin sigur nei, tí uppskotið staðfestir mentanarligan og átrúnaðarligan mun.



## Hvítusunnustevna á Sandoynni

**Skálavík:** Í døgunum 9. til 12. mai skipar Heimamissiónin fyri hvítusunnustevnu í missiónshúsinum í Skálavík. Landsarbeiðið hjá Heimamissiónini sum útvegar talarar og kór, meðan staðbundnu arbeiðini í oynni taka sær av øllum øðrum uppgávum. Á skránni eru møti øll kvøldini frá fríggjadegi til mánadag, umframt eitt ungdómsmøti og tvey familjumøti. Eisini verður vitjað á eldrasambýlunum í oynni. Í hvítusunnuvikuni verður innbjóðing send í hvørt hús í oynni.

# Mótmæla broyting í bygginevnd

**Fakfeløgini hjá lærarunum í avvarðandi skúlum mótmæla, at Kristina Háfoss hevur broytt bygginevndina fyri skúlamiðdepilin í Marknagili og krevja, at minst ein lærari frá hvørjum skúla framvegis er limur í bygginevndini**

MÓTMÆLI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Bergur Danielsen er formaður fyri tey trý fakfeløgini hjá lærarunum við Handilsskúlan, Tekniska skúla og Studentaskúlan*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Kristina Háfoss, landsstýriskvinna í skúlamálum, hevur broytt bygginevndina fyri skúlamiðdepilin í Marknagili soleiðis, at eingi umboð fyri lærararnar í avvarðandi skúlum longur eru limi í nevndini. Og tað góðtaka fakfeløgini í skúlunum ikki.

Hetta kunnu vit undir ongum umstøðum góðtaka, og vilja tí staðiliga heita á Landsstýriskvinnuna og MMR um at broyta hesa støðutakan, soleiðis at minst ein lærari í hvørjum skúla, t.e. TST, FH og FSH, framvegis er limur í Bygginevndini.

»Vit vita, at tað hevur stóran áhuga fyri allar partar í prosjektorganisatiónini, at vit fáa ein so dygdargóðan og tíðarhóskandi miðnámsskúla sum yvirhøvur gjørligt. Vit vita, at hetta ikki kann fremjast í verki, uttan at minst ein lærari frá hvørjum skúla er umboðaður í Bygginevndini í øllum fasum, har brúk er fyri slíkari nevnd.

Tað er okkara sannføring, at lærararnir á skúlunum, sum mugu metast sum einastu serfrøðingar á námsfrøðiliga økinum, eiga og skulu vera umboðaðir í slíkari nevnd frá A til Z. Kravið um umboðan gerst enn størri í og við, at MMR hava ætlanir um at leggja allar tríggjar skúlarnar saman, samstundis sum byggiverkætlanin fer fram.

Hetta kunnu vit undir ongum umstøðum góðtaka, og vilja tí staðiliga heita á Landsstýriskvinnuna og MMR um at broyta hesa støðutakan, soleiðis at minst ein lærari í hvørjum skúla, t.e. TST, FH og FSH, framvegis er limur í Bygginevndini.

Vit vita, at tað hevur stóran áhuga fyri allar partar í prosjektorganisatiónini, at vit fáa ein so dygdargóðan og tíðarhóskandi miðnámsskúla sum yvirhøvur gjørligt. Vit vita, at hetta ikki kann fremjast í verki, uttan at minst ein lærari frá hvørjum skúla er umboðaður í Bygginevndini í øllum fasum, har brúk er fyri slíkari nevnd.

Tað er okkara sannføring, at lærararnir á skúlunum, sum mugu metast sum einastu serfrøðingar á námsfrøðiliga økinum, eiga og skulu vera umboðaðir í slíkari nevnd frá A til Z. Kravið um umboðan gerst enn størri í og við, at MMR hava ætlanir um at leggja allar tríggjar skúlarnar saman, samstundis sum byggiverkætlanin fer fram«, siga tey trý fakfeløgini í einum mótmælisskrivi til landsstýriskvinnuna.

# Bátastevnan í Vestmanna verður 24. mai

**Nú styttist tíðin til árliga Bátastevnan verður í Vestmanna. Í ár verður Bátastevnan leygardagin 24. maj. Hetta er 7. árið á rað, at Bátastevnan verður hildin í Vestmanna**



Streymurin verður góður hendan dagin, og vónandi verður eisini veðrið til vildar, siga fyrireikararnir, sum síggja fram til, at nógvir bátar fara at leita sær til Vestmannar til hugnaligа samveru, tónleik og sang. Undanfarin ár hava eisini fólk við kampingvognum, motorsúklum og fólk á hestbaki umframt onnur vitja stevnuna, og eru hesi aftur í ár hjartaliga vælkomin.

Bátastevnan í Vestmann er størsta bátastevnan í Føroyum, og runt um landi frættist, at báteigarar og bátafeløg eru farin at rigga seg til, til henda dag. Luttøkan plagar at verða góð, upp í 200 bátar úr øllum landinum hava sett stevnu í Vestmanna.

Allir bátarnir savnast við Fútaklett. Gamli postbáturin "Ólavur" tekur ímóti og skipar innsiglingina til Vestmanna. Komnir at bryggju verður suppa við meir til luttakandi fólkið. Um kvøldi verður skipa fyri stóra Bátastevnudansinum í Ítróttarhøllini, har teir vælumtóktu lokalu dansibólkarnir, Brigde og Thunderbirds, spæla til dansin. Undanfarin ár hava nógv fólk møtt til dansin, og høllin er altíð fullsett.

Fyrireikingarnar til Bátastevnuna er komnar væl áleiðis. Millum annað verður gjørt klárt til at leggja bátabrúgvarnar út aftur, á sama hátt sum undanfarin ár. Hetta verður gjørt fyri at hava so góð atløguviðurskifti, sum gjørligt. Trygdin verður eisini sett í hásæti. Millum annað verða vaktarfólk á bryggjuni alla náttina. El-skáp verða sett upp, soleiðis at bátarnir kunnu fáa el umborð. Eisini verður øki til kampingvognar gjørt klárt við skipasmiðjuna, har hesir kunnu fáa bæði el og vatn.

Ætlanin er at skipa fyri fleiri tiltøkum á kajøkinum og í Ítróttarhøllini, bæði fyri vaksin og børn. Millum annað verða grillaðir búffar at fáa á kaiøkinum, og um dagin verða ymisk tiltøk í Ítróttarhøllini fyri børn. Somuleiðis verður møguligt at bíleggja rundstykkir til sunnumorgunin.

Tónleikur verður á kaiøkinum, og seinni um kvøldið verður eisini fýrverk. Tá stevnan nærkast, verður endalig skrá fyri Bátastevnuna 2008 kunngjørd.

Vestmanna Ítróttarfelag væntar, at tiltakið fær minst líka góða undirtøku sum undanfarin ár, og bjóðar hervið øllum vælkomnum á Bátastevnu 2008 í Vestmanna, leygardagin 24. mai 2008.